Útspæl til

# Fiskivinnunýskipan

Februar 2017

# Bakgrund

- Loyvini vórðu uppsøgd í 2008 og fara úr gildi 31. desember 2017
- Politisku útmeldingarnar eru ógreiðar og peika í fleiri ættir
- Stabilitetur eins týdningarmikil og burðardyggleiki
- Sleppast skal undan spekulatión
- Neyðugt er at aktørarnir í vinnuni kenna seg heima í skipanini
- Semja er um, at gjaldast skal fyri tilfeingisrættin

# Grandfathering

- Mælt verður til, at:
  - Í staðin fyri at fiskiloyvini verða uppsøgd, skulu *kvoturnar* heldur uppsigast
  - Søgulig rættindi útlutað millum aktørarnar, ið hava verið við til at gjørt rættindini søgulig
  - Rindast skal ein tilfeingisskattur, til dømis á 10%, av søluvirðinum
  - Harvið verður pláss fyri nøkrum fleiri skipum í flotanum
  - Nýggj loyvir kunnu seljast á uppboðssølu eftir norska modellinum (veiddur fiskur, ikki loyvi ella kvotur) við ásettum minstaprísi
  - Í praksis merkir hetta rullandi langtíðarloyvi

# Kvotaskipanin

- Burðardygg kvotaskipan við lívfrøðiligari tilráðing
- Nýggj rættindi boðin út, t.d. á uppboðssølu
- Fiskifrøðin og vinnan arbeiða saman og gera tilmæli saman um broytingar av kvotum, burðardyggleika og stovnsrøkt
- Hvørt skipið skal bert hava eina kvotu til hvørt fiskaslag

- Avreiðingargjald avtakast

# Stabilitetur í vinnuni

- Skulu veiðirættindini sigast upp, eigur hetta einans at vera gjørt við fleiri ára freist (t.d. 10 ár)
- Hetta fyri at tryggja endurnýggjan av flotanum og vinnutólunum, og fyri at lánsveitarar skulu hava ávísa trygd
- Veiðirættindini skulu vera umsetilig
- Óbrúkt rættindi fella tó aftur til landið

# Skattur heldur enn gjald

- Mælt verður til at:
  - Umleggja tilfeingisgjald til tilfeingisskatt, t.d. 10% av virðinum
  - Skatturin kann koma í staðin fyri partafelagsskattin
  - Skatturin skal býtast millum landið, heimstaðarkommununa hjá fyritøkuni og kommununa, haðani tilfeingið stavar (serliga galdandi fyri alivinnuna)
  - Í alivinnuni eru stórir møguleikar fyri størri vinningi enn í dag

# Dømi – skattur á virðisøking í øllum liðum

1. Fiskimaður selur kalva fyri 50,- til fiskahandlara

Rindar 5 krónur í skatti

2. Fiskahandlarin reinsar og virðisøkir kalvan og selur hann fyri 100,- til matstovu.

Rindar 5 krónur í skatti (10% av sølurpísi minus innkeypsprís)

3. Matstovan ger fiskin kláran at eta og borðreiðir hann. Gesturin rindar 200,- fyri virðisøkta kalvan.

Matstovan rindar 10 krónur í skatti (10% av sølurpísi minus innkeypsprís)








Skattur goldin: 5+5+10 = 20,- krónur,
svarandi til 10% av sølurpísinum í síðsta liði

# Fyrimunir:

- Tá tað gongst væl hjá vinnuni, gongst væl hjá øllum – skatturin er ein prosentpartur av søluvirðinum
- Skipanin er fullkomiliga gjøgnumskygd, og spekulatión nærum ógjørlig, tí goldið verður av søluvirðinum
- Inntøkurnar hjá tí almenna av skattinum standa altíð í relatión til marknaðarvirðið á fiskinum
- Rættvísari býti av ágóðanum, kommunur fáa eisini ágóða